


SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA
– heystið 2008

**Próvskeið í føroyskum**

Á skeiðnum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi, og tú fært betri fatan av føroyska málinum.

Skeiðið byrjar á Fróðskaparsetrinum, Jónas Broncks gøtu 25, 100 Tórshavn **15. september og endar 3. desember 2008** (12 vikur).

Próvtøkan verður 8. og 10. desember 2008.

Undirvísing er mánadagar og mikudagar, báðar dagar kl. 16.15–18.30. Frí er í viku 42. Harafturat er undirvísing (3 + 3 tímar) leygardagin 4. oktober.

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt sum móðurmál og hava gingið í miðnámsskúla ella samsvarandi.

Lærari: Lena Reinert

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbloð eru at fáa á setursskrivstovuni.

**Tilmeldingarfreistin er sett til 9. september 2008.**

Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 1.000 kr.**

Fyri próvtøku í føroyskum gjalda næmingar 500 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

SENDISTOVAN





## Umhvørvissamskipari til norðurlendska verkætlan

Søkt verður eftir einum samskipara til norðurlendsku umhvørvisverkætlanina EMS light-Nordic.

EMS light-Nordic verkætlanin er ein norðurlendsk verkætlan, sum miðjar ímóti at stuðla burðardyggari menning í teim smáu samfeløgunum í norðurlondum. Verkætlanin fer fram í Føroyum, Íslandi og Álandsoyggjunum og er grundað á eitt tætt samstarv millum virkir, feløg og umhvørvismyndugleikar.
Fleiri upplýsingar á www.ems-light.org

Til at loysa uppgávuna á nøktandi hátt fær samskiparin fakligan stuðul bæði frá innanhýsis ráðgevum hjá Atlanticon og hjá okkara samstarvsfelagum uttanlanda.

**Førleikar**
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni.
- Duga enskt í skrift og talu.
- Duga at leggja ein boðskap fram.
- Góður førleiki innan KT er ein fyrimunir.

Starvið er tíðaravmarkað í 6 mánaðar, men møguleiki er fyri at halda áfram við øðrum uppgávum fyri Atlanticon.
Tann, sum settur verður skal kunna taka aðrar uppgávur hjá felagnum.
Løn eftir avtalu.
Umsøkjarar, sum júst eru lidnir við at lesa eru eisini vælkomnir at søkja.

Umsóknin skal vera Atlanticon í hendi í seinasta lagi 15. september 2008.

Nærri kunning fæst við at venda sær til Atlanticon.

Sosialurin 341800

Atlanticon

Bryggjubakki 4 • PO Boks 263 • FO-110 Tórshavn • Tlf. (298) 319685 • Fax (298) 319185
atlanticon@atlanticon.fo • www.atlanticon.fo



## Maritime karrieremuligheder i herning shipping
Dæks- og Maskinofficerer samt Aspiranter





herning shipping afholder præsentationsmøde tirsdag den 16. september kl. 10.00 på Hotel Hafnia, Tórshavn, med efterfølgende mulighed for at få en uforpligtende samtale med rederiet. herning shipping vil også være tilstede på Hotel Hafnia onsdag den 17. september fra kl. 09.00 - 14.00.

**Kom og hør om dine karrieremuligheder til søs!**




WORLD CAREERS™

**Som led i vor løbende udvidelse af Rederiets tonnage tilbyder herning shipping gode karrieremuligheder i Rederiets DIS-registrerede flåde.**

For yderligere information kontakt Kasper Juul-Schirmer på tlf. +45 2969 8419 eller via mail crew@herning-shipping.com.

*herning shipping a.s. driver international rederi- og mæglervirksomhed og disponerer over 40 tankskibe. Rederiet beskæftiger ca. 400 medarbejdere - 350 til søs og omkring 60 i administrationen i Danmark, Frankrig og Singapore. Rederiet har godkendt kvalitetsstyringssystem i henhold til ISO 9001, ISO 14001, ISM, GMP + HACCP samt OHSAS 18001. Alle certifikater er udstedt af Lloyds register Quality Assurance for såvel skibe som administrationen.*

herning shipping



STARVSLÝSING

## Maskinlærlingur

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja 1. okt. 2008.

Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya handverkarafelag/Landsfelag handverkaranna og Føroya arbeiðsgevarafelag/Føroya handverksmeistarafelag. Lærutíðin er fýra ár og endar við sveinaroynd.

Vanligt koyrikort er neyðugt.

Umsóknir
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella til

Landsverk
postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. sep. 2008. Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, tlf. 540 950, ella Asbjørn Johannesen, smiðjumeistara, tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herímillum tyrlupallar.*